# Stjóri
## til
## P/f Landingarmiðstøðin
## á Tvøroyri

Vit sóknast eftir stjóra til Landingarmiðstøðina á Tvøroyri.

Starvið er spennandi og skiftandi, men eisini rættiliga umfatandi og krevst tí, at umsøkjarin hevur fyriskipanareginleikar og evni at standa fyri fólki.

Eisini er tað ein fyrimunur at umsøkjarin hevur førleika til roknskap.

Dámar tær avbjóðingar, vilja vit fegin koma í samband við teg.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Vinarliga vend tær til Gudmund Mortensen, nevndarformann á tlf. 371002, um spurningar ella ivamál eru.

Skrivlig umsókn kann sendast til P/f Landingarmiðstøðin á Tvøroyri, postbox 119, 800 Tvøroyri. Stíla: Gudmund Mortensen.

Umsóknarfreistin er 3. mars, og ætlanin er, at tú byrjar skjótast gjørligt.

**P/f Landingarmiðstøðin á Tvøroyri**

*P/F Landingarmiðstøðin á Tvøroyri ella bara LMT, sum vit kalla okkum, byrjaði sítt virksemi í januar 2004. LMT fæst við at landa skip, skilja fisk út til keyparar, pakka fisk til útflutnings, og annað í hesum sambandi. LMT arbeiðir í tættum samarbeiði við fiskavirkini í Suðuroynni og Fiskamarknaðin á Toftum. Á LMT starvast íalt 12 fólk.*

# Runavíkar kommunuskúli

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi restina av skúlaárinum til byrja sum skjótast.

Talan er um eitt fult starv, og í tímatalvuni eru m.a.:
- Rokning í 1. flokki flokslærara
- Enskt og rokning í 8. flokki

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til:

Runavíkar Kommuna
Postrúm 138
Saltangará

áðrenn 3. mars.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 447331 ella 217331.



**Runavíkar Kommunuskúli**
Ásmund Lamhauge,
skúlastjóri

# SKIVAN
## søkir leiðara

Leiðari søkist til Skivuna á Landavegnum. Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum.

Skivan er ein dynamiskur handil, við øllum bakara- og dagligvørum. Handilin er opin allar dagar í viku frá kl. 7.00 til 23.00.

Sum leiðari fært tú fulla ábyrgd av handilinum. Tú varðar av innkeypinum og søluni. Tú skalt leiða arbeiði hjá 18 starvsfólkum.

Vit sóknast eftir einum røskum og álítandi persóni, ið er tilreiðar at taka eitt eyka tak tá tað er neyðugt. Umráðandi er, at tú varðveitir yvirlitið, hóast nógvar uppgávur skulu loysast.

Tað er ein fyrimunur um tú kanst vísa okkum á viðkomandi royndir.

Góð løn til rætta persónin.

Ert tú tann vit leita eftir, so send okkum eina skrivliga umsókn innan 1. mars 2006.

**Sp/f Skivan**
Postsmoga 2168
FO-110 Tórshavn

Meiri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Torkil, tlf. 215455.

**Mentamálaráðið**

# Upptøka til journalistútbúgving

Tey, ið ætla sær til upptøkuroynd til útbúgving á Danmarks Journalisthøjskole, fáa upplýsingar um upptøkuroyndina og útbúgvingina á heimasíðuni www.djh.dk Umsóknarblað og prioriteringsskema kann heintast á heimasíðuni: www.optagelse.dk

Tey, sum ikki hava møguleika at søkja um upptøku á alnótini, kunnu venda sær til Mentamálaráðið (Boks 3279, FO-110 Tórshavn) og fáa tilfar og umsóknarblað sendandi.

Umsóknarblað og prioriteringskema saman við navnabrævi skulu verða skúlanum, ið umsøkjarin hevur sum 1. ynski, í hendi í seinasta lagi 15. mars 2006, kl. 12.

Upptøkuroyndin verður leygardagin 6. mai 2006.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá Mentamálaráðnum við at ringja á telefon 355060.

**Mentamálaráðið**

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Heimarøktin*

# Summarfrítíðar-avloysarir
## til Heimarøktina í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar frá 15. juni til 31. august 2006 at starvast í Heimarøktini í skiftandi vaktum og 3. hvørt vikuskifti.

Heimarøktin veitir tænastur dagliga millum kl. 8.30 og 23.30. Nærri upplýsingar um størvini fáast frá økisleiðaranum á tlf. 317249.

**Løn og setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknir saman við prógvi, autorisatión og upplýsingum um arbeiðsroyndir skulu vera økisleiðaranum í hendi seinast 27. mars 2006 kl. 12.00.

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Att: Økisleiðarin
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

Sankta Jósefs Barnagarður

Varðagøta 12, FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 28 54 · Fax. 31 69 90

Ert tú áhugað/ur at verða partur av einum væl samansjóðaðum jaligum starvsfólkabólki?

- So er tað tær vit hava tørv á.

Okkum tørvar ein pedagog 32 t. um vikuna fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi frá uml. 1. apríl 2006 og fyribils í eitt ár,

**og**

einum vikari, ið heitast kann á eftir tørvi.

Ljóðar hetta áhugavert?

Send okkum eina skrivliga umsókn innan 20. mars 2006.

# Vágs pensiónistafelag

hevur aðalfund 27. februar 2006 kl. 19.00 í fundarhølunum.

Aftaná aðalfundin verður limafundur við serligum hugna.

**Nevndin**